**Skaldsøgan Gandafjallið** – 5 ECTS, 3 tímar um vikuna frá februar til páska

*Lærari: Jógvan D. Hansen*

Der Zauberberg (Gandafjallið) eftir týska rithøvundin Thomas Mann verður mett sum ein av teimum stóru skaldsøgunum í 20. øld. Formliga er hon ein búningarskaldsøga, men møguliga eisini ein listinlærd keipumynd av hesum tekstaslagi. Frásøgnin er pallsett á einum bróstsjúkrahúsi í sveisisku alpunum. Høvuðspersónurin, Hans Kastorp, fer á eina ætlaða stutta vitjan hjá einum skyldmanni. Men støðgurin gerst heili sjey ár, og í hesum tíðarskeiði fær lesarin eitt nágreiniligt innlit í henda smáheim uppí í fjøllunum. At enda fylgja vit honum á vígvøllin í fyrsta heimsbardaga.

Innihaldsliga viðger Der Zauberberg ævig evni so sum lív og deyða, ást og tráan, tíð og tíðarinnar gongd og ikki minst list. Somuleiðis verða hugsjónir sum humanisma og einræði settar upp ímóti hvør aðrari og endavendar.

Verkið verður sett í eitt hugmyndasøguligt høpi og tulkað úr einum heimspekiligum sjónarhorni. Føroyskir tekstir, sum innihaldsliga nerta við somu spurningar sum Der Zauberberg, verða lisnir.

Próvtøka: Munnlig próvtøka við hálvtíma fyrireiking.

**#MeToo og bókmentir** – 5 ECTS, 3 tímar um vikuna frá páskum til hálvan mai

*Lærari: Soffía Auður Birgisdóttir*

Seinastu árini hevur kynsligur harðskapur móti kvinnum verið áberandi umrøðuevni í samfelagskjaki um allan heim, serliga í sambandi við #Me Too rørsluna, og tað endurspeglast eisini í samtíðarbókmentum. Harðskapur móti kvinnum er tó einki nýtt fyribrigdi, hvørki í samfelagnum sum heild ella í bókmentum. Á skeiðinum verður hetta evnið viðgjørt, soleiðis sum tað vísir seg í bókmentum, serliga íslendskum og føroyskum bókmentum. Hugt verður nærri at kvæðum, miðaldartekstum og nútíðarbókmentum, bæði søgum og yrkingum. Millum lestrartilfarið verða Skírnismál, yrkingaklingran hjá Gerði Kristný *Blóðhófnir*, úrval av íslendskum og føroyskum samtíðaryrkingum o.a. Í fyrilestrum verður evnið eisini viðgjørt í verkum eftir Halldór Laxness o.o., og nýggjar frøðigreinar um evnið verða lisnar.

Próvtøka: Skrivlig próvtøka í 4 tímar.